## DAGSINS MEINING

### Rættindi ella valagn
## – Tjóðveldið avbyrgir seg sjálvt

Formaðurin í Tjóðveldisflokkinum hevði líkasum hug at gera gjøldurburtur úr vallyftum hjá øðrum flokkum á vælferðarøkinum, tá flokkurin hevði tíðindafund um valskránna síðsta hósdag. Formaðurin vildi vera við, at hetta vóru bara mál, sum flokkarnir tóku upp fjórða hvørt ár sum valagn!

Pláss á ellis- og røktarheimum, pláss á dagstovnum og bústaður skuluvera sjálvsøgd rættindi. Tað vil Tjóðveldisflokkurin, og tað er "verulig vælferð", sum tað nú eitur, uttan danskan stuðul. Men er tann vælferð, um undanfarnu ættarlið løgdu lunnar undir, ikki verulig vælferð?

Tey, sum eru sosialt tilvitað, taka óivað undir við Tjóðveldisflokkinum í, at hesi nevdu øki eiga at verða rættindi. Men hetta málið er rættiliga prinsipielt og eigur eisini at flytast á onnnur vælferðarmál. Vit skulu minna á, at nógv vælferðarmál eru rættindi í dag, tí undanfarnir politikkarar a vinstraveingi - í Javnaðarflokkinum og Tjóðveldisflokkinum - staðfestu hesi rættindi í lóggávu!

Í hesum hallandi valskeiði hevur Javnaðarflokkurin lagt fyri tingið fleiri vælferðar- og trivnaðarmál. Men hvør hevur andøvt í móti saman við tí borgarliga Fólkaflokkinum? - Nei, hetta eru ikki mál, sum vit skulu lóggeva um. Hetta eru mál, sum partarnir á arbeiðsmarknaðinum eiga at semjast um! Tað hevur verið grundgevingin hjá tjóðveldisfólkum fyri ikki at taka undir.

Óivað kunnu partarnir á arbeiðsmarknaðinum semjast um summi trivnaðarmál í dag, men nógv vælferðarmál vóru ikki komin, um framskyggin tingfólk ikki høvdu lóggivið um tey.

Annars vildi Tjóðveldisflokkurin á tíðindafundinum vera við, at aðrir flokkar avbyrgja Tjóðveldisflokkin. - Er hesin pástandur ikki at venda málinum á høvdið, ella "grugga málið", sum formaðurin plagar at taka til um onnur?

Tjóðveldisflokkurin avbyrgir seg sjálvan við sínum víðgongda kravi um fullveldi, og við framsøgnini um, at løgtingsvalið er ein óbeinleiðis atkvøða um samband ella fullveldi. Hann avbyrgir ikki bara seg sjálvan, men rekur atkvøður beinleiðis upp í føvningin á Sambandsflokkin!

Avleiðingin verður, at vit fáa tveir stórar útjaðarar, samband og tjóðveldi, og støðan fer at læsa seg fasta. Miðan í tjóðaskparspurningin verður skerd, og tað verður trupult at fáa meiriluta fyri ein loysn, sum miðjan, fjøldin av Føroya fólki, vil og kann taka undir við. Vandi er tí fyri, at einki hendir á ríkisrættarliga økinum!

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Undirgrundarlygn?

**Christian M. Poulsen**



Æraðu forkvinna/menn politisku flokkanna ella øðrum, ið hava hug at svara.

Havi roynt at fylgt við tykkum, og sjálvsagt tykkum kunnugt hongur mikil orðavavstur í hjá øllum, ið bjóða seg fram.

Havi eisini roynt – av og á – at verið á nótini hjá danska fólkatinginum fyri at vita, hvussu landsins umboð okkara aftaná teirra strævnu flúgvitúrar landanna millum megna at siga okkurt skilagott. Lat tað fara. Okkurt skulu tómar hendur gera.

Ein skilamaður greiddi einaferð frá: "At undirgrundin var nú Føroyalands ogn." Hetta havi eg, og giti eg aðrir føroyingar hildið.

Túnatosið snýr seg nú sera ofta um olju: "Nær sprýkir hon, fara øll í Føroyum at koyra í Cadilacs, R.R. og fáa ókeypis fyltar tangar".

Var fyri stuttum á http://www.folketinget.dk/samling/20001/spor_sv/S1799.htm . Knappliga rakti eg við fyri mær nakað sera áhugavert. (Spm. nr. S 1799 – svarað 14.3-2001).

Ein maður frá "Dansk Folkeparti" Peter Skaarup nevndur, spyr táverandi løgmálaráðharran, Frank Jensen um, tað er rætt, at ognarrætturin til tað føroysku undirgrundina aldrin kann gevast føroyingum.

Frank Jensen svarar, at vit føroyingar, við "Råstofaftalen", bert hava fingið tann lóggevandi og umsitingarliga førleikan og kunnu aldrin fáa ognarrættin. Greið tala. Einfaldi spurningur mín til tykkara er: "Hvør eigur møguligu oljuna á landgrunni okkara??? Verri hevði sjálvsagt ikki verið, um Halgir W. Poulsen ella Atli P. Dam ønti mær eitt svar.

# Livilíkindi

**Dánial á Dul Jacobsen**



Á forsíðuni á Sosialinum tann 4. apríl verður sambandsflokkurin, við Lisbeth L. Petersen á odda, siteraður fyri at siga, at "Ríkisfelagsskapurin er fortreyt fyri lívi". Við tí sjálvsagda fyrivarni, at Lisbeth kann vera skeivt endurgivin, má eg tó siga, at sjálvdan hevur ein forsíðuyvirskrift givið størri ófrættakenslu enn tað sama. Her verður ikki greinað, hvat ella hvør lívsformur verður hugsað um, men vit mugu ganga út frá, sæð í tí høpi, tað verður sagt, at tað eru livikorini á Føroya landi, sipað verður til. Sagt verður í sjálvari greinini, at komandi løgtingsval verður eitt lagnuval um samband ella loysing. Helst er hetta so, og er tí best ikki at tiga.

Føroyar hava í øldir livað undir donskum harraveldi, og hava livikorini á klettunum verið júst í øvutum lutfalli til sambandið við Danmark. Jú tættari knýttar oyggjarnar hava verið at Danmørkini, tess verri hava livikorini verið, og tess meiri loyst vit hava verið, so mikið betri hevur verið at liva og virka í Føroyum. Sæð í søguligum hekkuljósi, so er tað við marruskelki, tú hugsar um, hvussu statt hevði verið á Føroya landi, um sambandið og sambandslyndið høvdu verið einastu politisku kostir føroyinga seinastu hálvtannaðhundrað árini. Hugsa tær eitt samfelag, har føroyska málið helst ikki var til, ella tað var so vongskert, at tað bert var til láturs hjá donskum embætisfólki. Har fría vinnulívið ikki var til. Har fólkatalið í Føroym bert var ein triðjingur av tí, tað er í dag, og har bert helvtin av tí triðjingi vóru føroyingar. Tíbetur er hetta bert hypotesa í dag, men tað er á ongan hátt sambandinum fyri at takka.

Tað samfelag, vit kenna í dag, byggir fyrst og fremst á tríggjar høvuðsfyritreytir. Í 1856 var kongaligi einahandilin avtikin, og føroyska handils- og vinnulívið mentist. Nakað seinni tekur tjóðskaparrøslan dik á seg, sum ber við sær politiska og málsliga tilvitan. Hesar báðar fyritreytirnar høvdu pr. defenitión mótstøðu frá sambandslyntum føroyingum.

Triðja fyritreytin fyri okkara nútíðarsamfelag er vekingarrørslurnar, sum eisini tóku seg upp í seinna helmingi av 19. øld. Hendan fyritreytin er fyri mær, uttan iva, tann týdningarmesta. Hon hevur eisni í ógvuliga stóran mun ávirkað hinar báðar fyritreytirnar.

Í dag kann alt hetta tykjast so langt síðani, at ilt er at skilja ímillum, hvaðani streymarnir komu, sum birtu uppundir framburðin, men søgan prógvar so ikki pástandin um, at sambandið ger tað liviligari í Føroyum. Tvørtur ímóti.

# Fría okkum frá Suna Jacobsen

**Ólavur Petersen**

Nú Sune Jacobsen, valevni sambandsfloksins í Vágum, fer í hernað móti loftbornu miðlunum fyri at vera sponsoreraður av Høgna Hoydal, so má tann stundin vera komin til handa, at spyrja formannin í sambandsflokkinum, um hon kann liva við at hava Suna Jacobsen sum valevni?

Tað er ovboðið, at tað skal verða Sune Jacobsen úr Sørvági, sum skal ákæra Øssur úr Sjónvarpinum og Bjørt í Útvarpinum fyri pening at geva Høgna Hoydal framíhjárætt í teirra miðlum.

Hvørki landsorganisatión sambandsfloksins ella organisatiónin hjá sambandsflokkinum í Vágum skulu brúka langa tíð til at vita, hví sambandsflokkurin ikki eigur at kunna liva við Suna Jacobsen sum valevni.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.



## VIÐMERKINGAR

# Sjónvarpið, mentan ella køstur?

**Jan Jacobsen**

Tað er í tíðini nógv frammi, um sjónvarpið skal verða meiri føroyskt, um vit hava ráð til føroyskt sjónvarp, ella um vit hava nakran møguleika til at gera føroyskar sendingar í størri mun enn higartil. Tað verður lagdur dentur á, at nógvar milliónir mugu brúkast afturat, fyri at betra um sjónvarpið, sum íkast til góða føroyska mentan.

Vit hava tíðindasendingar frá útlendskum tíðindastøðum, sum vísa á støðuna í heiminum í dag, eisini verða føroyskar sendingar um heimlig viðurskifti væl lýst. Hesin parturin saman við nógvum øðrum sendingum, so sum, tá fjøllini verða gingin, lívið á sjónum, nakrar barnasendingar og mangt annað er nógv vert og eitt gott ískoyti til okkara mentan. Aðrar útlendskar undirhaldssendingar, dokumentarsendingar, djórafilmar og annað eru eisini áhugaverdar at síggja.

Men so eru eisini sendingar, sum hava ógvuliga nógvan harðskap og ómoral. Heilir filmar eru, sum bert snúgva seg sum sex, ella so nær porno, sum tað kann lata seg gera. Filmar, sum eru um misbrúk, siðloysi og lógloysi, viriðisloysi, neyðtøku, vernd av homoseksualiteti og ótrúskap ofta uttan nakra veruliga handling og uttan nakran boðskap.

Aftur til milliónirnar. Er henda ífyllan av tilfari av slíkum slag funnin í onkrari útlendskari skrellispann, sum av teirri orsøk verður víst, tí at tað er bíligt at fáa hendur á? Hvønn flokk av borgarum vil sjónvarpið náa við hesum tilfarið? Eru tað tey ungu, sum skulu verða fylt við harðskapi og missa alla virðing fyri hvat kærleiki ímillum mann og konu er? Ella verður hildið, at tey gomlu hava tørv á hesum sendingum, sum part av lívskvaliteti í aldurdóminum?

Flestu húski gjalda sjónvarpsgjald og hava tí rætt at síggja brúkbart sjónvarp, men sum gongdin hevur verið versnar skjótt, vit eru á eggini til frítt porno saman við so ógvusligum harðskapi. Hvat er so endamálið við hesum sendingum? Eitt er víst, at um hetta er tað, sum ungdómurin skal matast við ár út og ár inn, so verður ikki long tíð fyrr enn vit síggja fruktirnar av hesum. Vit sleppa ikki undan lógini, sum sigur: Sum tú sáðar, skalt tú heysta.

Í dag verður nógv tosað um persónligt frælsi, eisini ímillum politikarar, men eitt er vist, at tað, sum verður borðreitt við í sjónvarpinum leiðir ikki til persónligt frælsi. Hinvegin, um nokk verður hugt, elva hesar sendingar til ein hugburð av uppreistri móti sonnum menniskjavirðum og dálkan m.a. sinnið, tosingarlagið og kann leiða til eitt ógvuliga óheppi lívsmynstur.

Tað kann ikki vera rætt, at tú skalt gjalda fult sjónvarpsgjald, tá ein partur av sendingunum er so ómoralskur, at tað kennist, sum tú hevur ein køst í stovuni. Tíðin í dag er merkt av, at vit skulu ráða sjálvi, yvirtaka øki fyri øki og hetta krevur ábyrgd. Sjónvarpið er føroyskt, lat okkum tí vísa tað ábyrgd, at vit virða okkara fólk við einum virðiligum sjónvarpið.

Tað er ikki nóg gott at seta aldursmark á filmar, ella skriva, at teir eru óhóskandi fyri børn. Teir eiga ikki at verða vístir, heldur færri tímar við góðum tilfari, enn fleiri tímar við tí tilfari, sum nú er. Ábyrgdin er stór, bæði hjá sjónvarpsstjóranum, foreldrum, politikarum, prestum og samkomuleiðarum. Tí vóni eg, at hetta málið verður tikið upp til viðgerðar í størsta álvara, so vit kunnu hava eitt sjónvarp, sum kann geva signing.

Í 5. Mós. 28,1-2 stendur: "Um tú nú ert harranum, Guði tínum, lýðin, so at tú vandaliga heldur øll boðorð hans, sum eg í dag leggi fyri teg, tá man Harrin, Guð tín, hevja teg yvir allar tjóðir á jørð; og tá munu allar hesar signingar verða tær fyri og sannast á tær, um tú lýðir rødd Harrans, Guðs tíns." Latið okkum tí ikki senda tilfar inn í okkara egnu heim, sum steingja fyri signingini og tí persónliga frælsinum, men lat okkum hava eitt gott og reint sjónvarp, so Guð kann lata sína signing hvíla yvir tí.

# FLAKA-fólkið fyrst

**Malan Helgadóttir**
*Miðvágur valevni Javnaðarfloksins*



Tá javnaðarflokkurin fer til val við slagorðinum "fólkið fyrst", eru tað ikki minst verkafólkini vit hava í huga.

Rættin hjá verkafólkinum til støðug, trygg og gevandi arbeiðspláss er eins sjálvfylgjandi og hesin rættur hjá øllum øðrum bólkum í samfelagnum.

Hesum korum hevur javnaðarflokkurin stríðst fyri síðan stovnan. Nevnast kann minstaløn hjá sjómonnum, ALS, samhaldsfasti, Arbeiðseftirlitið, pensiónir o.s.v.

Men eisini at menna vinnulívið hevur verið okkara hjartamál, og hvør kennir ikki støðu Javnaðarfloksins, at har tað privata ikki røkkur, skal tað almenna hjálpa til.

Soleiðis bleiv stuðla uppundir endurnýggjan av fiskiskipaflotanum, nýskipanin av Kjølbro fyritøkuni, stovnsetan av okkara tjóðarflogfelag, bankabjargingin og umskipanin av flakavinnuni fyri at nevna nøkur.

Í omanfyri nevndu dømum hevur Javnaðarflokkurin gingið á odda; partvíst fyri at skapa og stuðla uppundir nýggj arbeiðspláss og nýggjar vinnumøguleikar, men so sanniliga eisini fyri at verja verðandi arbeiðspláss, sum stóðu fyri hóttafalli.

Føroya Fiskavirking var ein trupul men neyðug loysn í truplum tíðum. Seinri hevur tað víst seg eisini at verða ein góð loysn. Ein loysn, sum hevur givið 800 flakafólkum kring landið støðug, trygg og mennandi arbeiðspláss, men ikki minst hevur víst vegin fyri lønandi flakavinnu frameftir.

Javnaðarflokkurin vil eisini í komandi tíðum virka fyri, at tryggja hesi og onnur arbeiðspláss hjá verkafólkum. Tað gera vit best við at skapa góðar vinnukarmar og ikki minst við at stuðla uppundir nýskapan og menning gjøgnum Framtaksgrunnin og Vinnuframagrunnin.

# Tvøramenn og vágbingar á einum máli!

**Nita Næs í Nesi**
*Hvalba*



Tað var heldur sjáldsamt at hoyra, at borgarstjórin á Tvøroyri og borgarstjórin í Vági vóru púra samdir um, at "tilhoyrandi" løgtingsmenn skuldu gjalda skatt á Tvøroyri og í Vági og als ikki í Havn. Hvar teir gjalda skatt er líkamikið í mínum hugaheimi. Tad er at undrast á, hví menniskja er so samansett sum tad nú einaferð er. Og hví fólk, sum ikki kunnu verða samt um felags mál - Suðuroynni at gagni, kunnu verða púra samd, tá tað um eins egnu kommunu ræður.

Suðuroyggin er jarðfrøðisliga ein long og smøl oyggj. Vit liggja longst vekk frá øðrum oyggjum. Og eru tí í eini ella aðrari serstøðu. Vit eru mangan í andstøðu við restina av Føroyum, tí vit onkursvegna kenna okkum gloymdan ella aftur úr sigldan. Nøkur eru vit tó, sum eftir lokna útbúgving ella eftir at hava búð í fremmandum londum, tilvitað flyta aftur til Suðuroynna. Henda vakra oyggin hevur onkursvegna ligið og lokkað. So sum árini ganga og ein við tíðini aftur verður lokalur, eru tað mangir spurningar, ið stinga seg upp. Hví hava fólkavaldir løgtinsmenn úr Suðuroy enn ikki klárað at fáa okkum tunnulin millum Øravík og Hov? Tað er heilt víst, at um teir høvdu samstarvað, staðið sterkir sum ein maður, so var tunnulin fyri fleiri árum síðani veruleiki. Somuleiðis kundu vit spurt? Hví skulu vit nú fara at byggja tvær stórar og kostnaðarmiklar havnir út í Suðuroy? Vit suðuroyingar kunnu væl saktans samstarva og góðtaka at ein góð nýggj havn til nýggja Smyril, nýggju Norrønu ella hvat stórt skip tað skal vera er ivaleysa gott!

Hví ikki bara verða samt um at sigla á Tvøroyri, og so kundu tit brúkt hasar 20 mill.( ella hvat tað fer at kosta at útbyggja havnina í Vági), til at gera tunnil og tveysporaðan veg heilt av Tvøroyri suður til Vágs. Hetta at Smyril skal sigla einaferð um vikuna á Vág, og at tað er lógarfest, vísir aftur á sundurlyndið í okkum. Tad er eingin ivi um, at høvdu løgtingsmenn og bý- og bygdaráð gingið á odda og víst ein sterkan Suðuroyar felagsanda, so hevði nógv kunna verið øðrvísini í Suðuroynni. Einki kemur í ein knýttan neva, ein má tora at vísa opinleika, tora at missa, tora at hugsa nýtt og vísa á annan hugburð. Hetta at Tvøroyri "eigur" norðaru helvt av oynni og Vág "eigur" sunnaru helvt av oynni, er heilt burturvið og byggir einki upp. Havi hoyrt skilamenn úr Vági siga, at teir heldur skuldu doyð enn arbeitt á Tvøroyri. Hvat er hetta fyri arvur at geva yngra ættarliðnum? Slíkir menn eru ikki skilamenn longur. Slíkar hugsanir skapa einki.Deyðin er lættur at nevna, men ringur at fevna.

Um vit hugsa um miðnámsskúlan í Suðuroy, so hevur skúlin eina langa søgu. Aftur her er tað sundurlyndið í okkum suðuroyingum, ið ger, at skúlaprojektið nú er endað vesturi á Vágseiði. Hví varð ikki hildið fast um upprunaætlanina? Tað kann hugast, at við einum skúladepil í Hovi, var eitt lítið fræ sátt har víst var á, at aðrir møguleikar eru í oynni - enn Vágur og Tvøroyri. Frá einum av okkara nógvu landstýrismonnum í mentamálum fingu tvøramenn Heilsuskúlan sum plástur á sárið, so teir hava sum so einki sagt nú Miðnámsskúlin er farin vestur um Gjógvará.Í Suðuroy er tað einki sum eitur eitt felags oyggjarynski, ein felags ætlan, sum t.d.vísir hvar ymisku skúlarnir, stovnar ella arbeiðsplás skulu vera. Ella at hugsað verður, hvat siga smærru kommunurnar til, hetta ella hatta. Ella at smærru kommunurnar siga til, at hetta ella hatta finna vit okkum ikki í. Eitt er so heilt víst, at um eg gekk hús úr húsi og spurdi fólk, hvat tey hildu, so høvdu so gott sum øll ikki funnið seg í, at vit enn einaferð byggja tvær "atlantshavnir" út til eitt og sama endamál.

Eitt ynski havi eg: Lati ikki Øravík-Hov tunnulin verða eitt politislt mál, valagn ella vallyftið.Hetta lyftið hava vit suðuroyingar fyri nógvum árum síðani fingið lovað frá øllum politiskum flokkum. Standa vit suðuroyingar ikki saman, saman óansæð politikk, bygdaklandur og uppruna. Ja, so tapa vit og verða ein oyggj, har tey ungu ikki flyta til aftur.

Samanhald kemur ikki av sær sjálvum. Tað er bara ein sjálvur, ið kann læra seg sjálvan, at hugsa gott, nýtt og øðrvísi.